# Tryggingar



**Skaði á tykkum (persónskaði)**

- Heiltíðarvanlukkutrygging
- Arbeiðsskaðatrygging

**Skaði á onnur**

- Vinnuábyrgdartrygging

**Aðrar tryggingar**

- Bygningar, leysafæ, bilar

# Heiltíðarvanlukkutrygging

betri

- Dekkar tryggjaða alt samdøgrið
- Um skaði hendir

# Heiltíðarvanlukkutrygging

betri

Hvør er tryggjaður?

- Tryggingin fevnir um allar aktivar limir og venjarar hjá ÍSF – tað eru limir í ítróttarfeløgum undir ÍSF.
- Undantikin eru spælarar, ið eru sáttmálasettir og onnur, ið eru í starvi hjá felagnum.

Umfataðar skaðaorsøkir

- Vanlukkutilburðir, t.v.s. ein brádlig hending, ið elvir til likamskaða.

# Hvar tekur tryggingin við

Tryggingin tekur við undir ítróttarkapping ella venjing í Føroyum, sum er fyriskipað av ÍSF ella sersambandi.

# Heiltíðarvanlukkutrygging

betri

Veitingar

- Veiting við deyða kr. 250.000 (undir 18 ár kr. 25.000)
- Veiting við avlamni kr. 500.000
- Ískoytisendurgjald við avlamni 30% ella meira
- Viðgerðarútreiðslur max. 1% av avlamisupphæddini, hetta eru neyðugar útreiðslur til læknafyriskipaðar viðgerðir hjá sálarfrøðingi, fysioterapeuti og eisini rímiligar útreiðslur til kiropraktor.
- Tannskaðar max. 5% av avlamisupphæddini
- Brillur

# Heiltíðarvanlukkutrygging

betri

Dømi ískoytisendurgjald.

- Fyri læknafrøðiligt avlami verður útgoldið stighækkandi endurgjald, tá avlamisprosentið fer uppum 30%.
- Tað vil siga, at um avlamni er 40% verður útgoldið 40% av kr. 500.000 sum er kr. 200.000. Afturat hesum verður 40% av kr. 200.000, sum er kr. 80.000,00 útgoldið.
- Endurgjaldið við 40% avlami verður íalt kr. 280.000.
- Við 100% avlami verður útgoldið kr. 1.000.000,00 frá heiltíðarvanlukkutryggingini.

# Fráboðan av skaða

betri

- Skaddi útfyllir skaðafrágreiðing.
- Felagið, sum skaddi íðkar hjá, váttar, at skaðin er hendir í samband við ítróttina (venjing/dyst).
- Oyðublaðið verður síðani sent víðari til ÍSF skrivstovunu, sum so aftur váttar, at viðkomandi er limur og avgreiðir frágreiðingina til Betri Trygging.
- Skaddi/ella verjin hjá skadda skrivar samstundis undir uppá, at Betri Trygging kunnu útveksla heilsuupplýsingar við læknar, sjúkrahús o.o, sum er viðkomandi fyri skaðaviðgerðina.

# Arbeiðsskaðatrygging

betri

Arbeiðsskaðatrygging verður teknað fyri: Sáttmálasettar leikarar og venjarar og onnur starvsfólk í starvi hjá felagnum t.d. húsavørðar og reingerðarfólk.

Arbeiðsgevari hevur tryggingarskyldu fyri persónar hesin setur í starv, fyri løn ella ólønt, á føroyskum land-, sjó- ella loftrúmi.

<u>Arbeiðsskaðalógin</u>

Endamálið við arbeiðsskaðalógini er at veita endurgjald til persónar, ið koma til skaða, ella teirra avvarandi, orsakað av óhappi í sambandi við útinnan av arbeiði.

# Arbeiðsskaðatrygging

Umfataðar skaðaorsøkir

Vanlukkutilburðir, ið standast av arbeiðinum ella teimum viðurskiftum, arbeitt verður undir.

Brádliga hendir lyftiskaði sambært útgreiningini í §9

Vinnusjúkur sambært útgreiningini í §10

# Arbeiðsskaðatrygging

betri

Veitingar

- Útreiðslur til hjálpitól, brillur v.m.
- Sjúkuviðgerð, uppvenjing v.m.
- Dagpeningur smb. dagpeningaskipanini hjá Almannastovuni
- Endurgjald fyri mist vinnuføri
- Endurgjald fyri varandi mein
- Skiftisveiting til eftirsitandi hjúnarfelaga ella onnur
- Endurgjald til vaksin og børn fyri miss av uppihaldara

# Arbeiðsskaðatrygging

betri

Mannagongd

- Skaðin skal fráboðast til tryggingarfelagið har arbeiðsskaðatrygging er teknað.
- Oyðublað til skaðafráboðan skal útfyllast og undirskrivast av arbeiðsgevara og skadda
- Læknaváttan I skal skrivast av læknanum og skal sendast inn saman við skaðafráboðanini
- Tryggingarfelagið sendir Vanlukkutryggingarráðnum málið til støðutakan og víðari viðgerð
- Brilluskaðar vera tó viðgjørdir av tryggingarfelagnum
- Endalig avgerð um endurgjøld verður tikin av Vanlukkutryggingarráðnum, tá støðan er støðug
- Avgerðirnar kunnu kærast til Ankestyrelsen

# Aðrar persónstryggingar

- Lívstrygging
- Óarbeiðsføristrygging
- Bráðsjúkutrygging
- Viðgerðartrygging

# Skaði á onnur - Ábyrgd

betri

**Vinnuábyrgdartrygging**

Vinnuábyrgd er ábyrgd fyri skaða, sum tey tryggjaðu kunnu vera áløgd eftir vanligum rættarreglum, fyri skaða, sum gerst á fólk og lutir, í samband við tað virksemi, sum er tilskilað í tryggingarskjalinum.

Umframt at veita endurgjald fyri endurgjaldsábyrgdina, tryggingin fevnir um, verja tryggingarnar eisini ímóti krøvum, har eingin endurgjaldsskylda er.

# Skaði á onnur

betri

Vinnuábyrgdartrygging

Hvørjum er tryggingin ætlað

Øllum virkjum, stovnum, feløgum og fólkum annars, sum fáast við vinnuligt virksemi.

Standard tryggingarhædd:

- Skaði á lutir, kr. 5 mio. pr. skaða og í mesta lagi pr. ár.
- Skaði á persón, kr. 10 mio. pr. skaða og í mesta lagi pr. ár.

# Aðrar tryggingar

betri

- Bygningstryggingar
- Leysafæ
- Bilar

# Takk fyri

betri